# Danmark fer nú upp í rakettverjuætlanina

**Danska stjórnin fer um 14 dagar at boða USA frá, at Danmark er til reiðar ar fara upp í rakettverjuætlanina. Tað kann hava við sær, at støðin í Thule skal byggjast út**

HERNAÐARMÁL
*Árni Joensen:*



*Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri er nú til reiðar at boða USA frá, at Danmark er sinnað at fara upp í rakettverjuætlanina*

Tá amerikanarar fóru at tosa um at gera eina verjuskipan, sum skal verja Vesturheimin ímóti rakettálopum frá sokallaðum »óstøðugum londum«, gjørdist greitt, at teir ætlaðu at nýta herstøðina í Thule sum eitt lið í skipanini.

Danmark fekk tó ongan fyrispurning um at lata amerikanarar nýta støðina í Grønlandi, og táverandi forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, gjørdi greitt, at danska stjórnin fór ikki at viðgera málið, fyrr enn hon fekk ein formligan fyrispurning úr USA. Tað sama segði táverandi uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen.

Núverandi forsætisráðharrin, Anders Fogh Rasmussen, hevur sagt tað sama sum undanmaðurin, síðani hann tók við, og Per Stig Møller, uttanríkisráðharri hevur havt somu støðu.

Men nú hevur stjórnin broytt støðu. Danmark hevur framvegis ikki fingið nakran formligan fyrispurning úr USA um rakettverjuætlanina, men kortini hevur stjórnin viðgjørt málið í loyndum saman við flokkum í Fólkatinginum. Úrslitið er, at Danmark nú fer at boða USA frá, at landið er til reiðar at fara upp í rakettverjuætlanina.

### Thule útbyggjast

Í Keypmannahavn verður hildið, at stjórnin fer at boða USA frá broyttu støðuni, tá NATO-londini fara at halda fund í París um fjúrtan dagar.

Avgerðin kann fara at bera í sær, at amerikanska støðin í Thule skal byggjast út, so útgerðin kann nýtast til ta ætlaðu rakettverjuskipanina. Grønlendska heimastýrið hevur fyrr sagt, at tað fer at krevja orðaskifti um ætlanina, áðrenn nøkur útbygging verður sett í verk, og uttanríkispolitiski talsmaðurin hjá Vinstraflokkinum, Troels Lund Poulsen, segði í gjár, at stjórnin fer at tosa við grønlendska heimastýrið, áðrenn nøkur endalig avgerð verður tikin.

Allir danskir politikarar hava ikki verið fyri amerikansku ætlanini. Teir bera ótta fyri, at ætlanin kann fara at skunda undir eina nýggja vápnakappdubbing millum USA, Russland og Kina.

# Framvegis ósemja í ES um fiskivinnupolitikkin

**Tíðin er nú farin at ganga undan hjá teimum, sum skulu smíða tann nýggja fiskivinnupolitikkin hjá ES, men enn er langt á mál**

FISKIVINNU-POLITIKKUR
*Árni Joensen:*



Í summar kunngjørdi fiskivinnukommiserurin hjá ES, týskarin Franz Fischler, at tað er neyðugt at endurskoða fiskivinnupolitikkin hjá samveldinum. Samstundis legði hann fram eina ætlan, sum hann og ES-nevndin í Bruxelles høvdu lagt, og sum miðjaði eftir at skerja fiskiflotan munandi fyri at verja fiskastovnarnar.

Uppskotið møtti harðari mótstøðu í teimum suðurevropeisku limalondunum. Serliga spaniumenn, portugisar og fransmenn funnust at uppskotinum, sum fór at bera í sær, at júst tey suðurevropeisku londini máttu skerja sínar fiskiflotar munandi. Harafturat sigur uppskotið, at allur fíggjarligur stuðul til nýbygging skal takast av, og at pengarnir ístaðin fyri skulu nýtast til upphøgging. Í teimum norðaru limalondunum vístu fiskimenninir harafturímóti á, at tey hava longu skert sínar flotar munandi, og tað nú áttu starvsfelagarnir fyri sunnan tørn.

### Endurnýgging neyðug

Á odda fyri samráðingunum um tann nýggja politikkin stendur danski fiski- og matvørumálaráðharrin, Marianne Fischer Boel. Hon hevur íseinastuni havt ein hóp av fundum um uppskotið, samstundis sum embætisfólk hava tingast um tað.

Í vikuni var franski fiski- og landbúnaðarmálaráðharrin, Hevé Gaymard, í Keypmannahavn, har hann hevði ein drúgvan fund við sín danska starvsfelaga. Aftan á fundin segði franski ráðharrin, at stjórnin í París er sinnað at virka fyri einari neyðsemju um fiskivinnupolitikkin, men hann legði dent á, at Frakland fer ikki at góðtaka, at stuðulin til nýbygging verður tikin av, tí tað er neyðugt at endurnýggja fiskiflotan.

– Vit mugu tryggja okkum, at tilfeingið verður betur umsitið, men vit eiga ikki at forða fyri, at flotin verður nútímansgjørdur. Alt ov mong skip eru í vánaligum standi, og alt ov nógvir fiskimenn hava tí vánaligar arbeiðsumstøður, segði Hervé Gaymard.

### Fiskidagar

Marianne Fischer Boel hevur fyrr sagt, at tað verður torført at røkka einari semju um tað upprunaliga uppskotið, og at tað tí verður neyðugt at finna eina ella aðra neyðsemju. Men hon skal bera skjótt at, tí ætlanin er, at uppskotið skal leggjast fyri toppfundin hjá ES í Keypmannahavn í næsta mánað.

Hildið verður, at tey suðurevropeisku londini fara at fáa sín vilja, soleiðis at stuðul framvegis skal latast til nýbygging. Samstundis skal eftirlitið við fiskiskapinum herðast, leiðir skulu steingjast, og tað er eisini hugsandi, at ein skipan fyri fiskidøgum kemur afturat kvotuskipanini.



# Færri brendar tenn í Føroyum

**Frá 1991 til 2001 minkaði talið av holum í tonnunum hjá børnum millum 5 og 7 ár við næstan einari helvt. Vánaliga keypiorkan í kreppuárunum hevur verið til stóran gagn fyri tannheilsuna**

HAGTØL
*Heri á Rógvi*

Almanna- og heilsumálastýrið hevur almannakunngjørt eina frágreiðing, sum vísir kariesskráseting í Føroyum frá 1991 til 2001.

Sum heild má sigast, at gongdin er tann rætta vegin.

Tað er skrásetinganevndin hjá Føroya Tannlæknafelag, sum hevur staðið fyri arbeiðinum. Skrásetingin er lógarbundin og umbiðin av Almanna- og heilsumálastýrinum – nú Trivnaðarmálaráðið.

Frágreiðingin tekur støði í børnum í aldrinum 0 til 16 ár. Arbeitt verður við ásetingunum frá WHO, t.e. World Health Organiastion.

### Kreppan góð

Frá 1991 til 2001 minkaði talið av holum í tonnunum hjá børnum millum 5 og 7 ár við næstan einari helvt. Eisini er talið av brendum tonnum hjá 7, 12 og 15 ára gomlum minkað nógv seinastu tíggju árini.

Í eftirmetingini verður sagt, at tað var í kreppuárunum, frá 1991-1996, at størsta broytingin til tað betra fór fram í tannheilsuni hjá føroyingum.

—Hesi árini var kreppa í føroyska samfelagnum og umstøðurnar hjá barnafamiljum gjørdist peningaliga trongar. Hugsast kann, at vánaliga keypiorkan gjørdi, at ovurnýtslan av góðgæti minkaði samsvarandi. Hetta saman við fyribyrgjandi tiltøkunum innan tannheilsuna, man hava viðvirkað til betraðu tannheilsuna, stendur at lesa í eftirmetingini í frágreiðingini.

Í somu eftirmeting stendur somuleiðis at lesa, at nú tíðirnar eru betri í Føroyum, so er ovurnýtslan av góðgæti eisini til staðar. Tannheilsan batnar tó framvegis – tó spakuliga. Okkurt kundi so týtt upp á, at vit í Føroyum eru vorðin raskari við tannbustini. Hildið verður eisini, at medvitið um tannheilsu er størri nú enn fyri 10 árum síðani.

— Skal úrslitið gerast betur, krevst ein hugburðsbroyting, bæði samfelagsliga og politisk, til kost og heilsu sum heild, verður staðfest í frágreiðingini, sum tannlæknarnir Sigrid Arge, Steintór Larsen og Unn Jacobsen hava staðið fyri.



*Minni góðgæti gevur betri tenn, og neyvan nakra aðrastaðni hevur gongdin í tannheilsuni verið so positiv sum í Føroyum.*
*Mynd: Álvur Haraldsen.*

### Færri hol

Hyggja vit eitt sindur eftir teimum ymsu tølunum og teimum ymsu talvunum í frágreiðingini er gongdin á leið tann sama allastaðni.

Føroysk børn hava seinastu tíggju árini fingið støðugt betri tannheilsu. Í øllum aldri, at talið av holum í tonnunum minkandi, og torleikastøðið er eisini batnað munandi.

Sum nevnt er tað serliga í árunum 1991-1996, at betringin er hend.

Frágreiðingin vísir, at ringasta staðið í Føroyum innan tannheilsu er á Oyri, t.e postnummar 450, sum yvirlitið er býtt upp eftir. Í øllum aldursbólkum fáa tey í bólkinum við postnummarinum 450 størsta talið av brendum tonnum.

Men, sum heild stendur væl til, tá hugsað verður um betringarnar. Føroyar liggja eisini væl fyri samanborið við onnur lond. Vælferðarsamfelagið Føroyar eru røttu megin markið, ið WHO hevur ásett fyri øll lond í heiminum.

# Ovurstór dálking í Føroyum

**Ein kanning, ið Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur gjørt fyri oljumálaráðið, vísir, at Føroyar eru millum ringastu lond í heiminum tá tað viðvíkur dálking**

DÁLKING
*Heri á Rógvi*

Tað verður dálkað ógvuliga illa í Føroyum. Í Føroyum er útláti av CO2 (koltvíilt) millum tey hægstu í øllum heiminum, og hetta eru skelkandi tøl, tá hugsað verður um, Føroyar vanliga verða roknaði fyri at vera eitt umhvørvisliga gott stað í heiminum.

Ùtvarp Føroya skrivar á heimasíðu sínari, at síðani 1995 hevur tað eydnast so at siga øllum teimum londum, sum Føroyar vanliga sammeta seg við at fáa minkað um útlátið av vakstrarhúsgassum. Men her á landi gongur tað skeiva vegin: Síðani 1990 eru samlaðu nøgdirnar av koltvíiltu í Føroyum hækkaðar 11 prosent.

Eyðun Elttør er landsstýrismaður í oljumálum. Hann sigur, at tað kom óvart á hann, at dálkingin var so ring í Føroyum. Hann ætlar nú at fara at kann, hvørji stig skulu takast víðari fyri at minka um dálkingina aftur.

# Skuldsettur fyri harðskap

**Ein maður varð seinnpartin tikin í Klakvík fyri at hava sligið pápa sín og gjørt ónáðir. Hann gekk við einum avkappara í hondini, tá hann varð tikin**

POLITITÍÐINDI
*Heri á Rógvi*

Løgreglan í Klaksvík upplýsir, at ein maður miðskeiðis í fjørutunum varð handtikin seinnapartin hósdagin.

Maðurin varð tikin tætt við Kirkjuna í Klaksvík, men hann hevði áðrenn reikað runt í bygdini.

Løgreglan varð fráboðað um rok. Tað eydnaðist manninum at sláa ein annan mann so illa, at hesin noyddist á sjúkrahús við skaða í andlitinum. Hetta hendi heima við hús, og talan er um pápan hjá manninum, sum altso endaði á sjúkrahúsi.

Fyri at gera ilt verri gekk maðurin eisini við einum stórum avkappara (avhøvdara) í hondini.

Løgreglan í Klaksvík upplýsir, at maðurin ikki hevur gjørt nakra skaða við knívinum, og so vítt tey vita á støðini, hevur maðurin heldur ikki hótt nakran við knívinum.

Maðurin var ávirkaður av rúsdrekka. Hann verður skuldsettur fyri harðskap. Maðurin er fluttur til Havnar til grundlógarforhoyr, men tað eydnaðist okkum ikki at fáa at vita, hvussu tað spældi av, áðrenn blaðið fór til prentingar.

# J-dagur fríggjadagin



*Hesar verða settar í fokus, tá hildin verður J-dagur kring landið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Fríggjadagin verður J-dagur hildin á vertshúsum kring landið**

J-DAGUR
*Heri á Rógvi*

Fríggjadagurin 8. november verður í ár sermerktur á tann hátt, at tann árligi J-dagurin verður hildin á hesum degi.

Tað er hendan dagin, at klubbar, vertshús og onnur við skeinkiloyvi hátíðarhalda fyrsta dagin, tá jólaølin hjá Føroya Bjór kemur út.

Á flest øllum støðum við skeinkiloyvi kann ein jólabryggj keypast fyri ein bíligan penga.

Jólabryggin kemur út á hvørjum ári. Í ár er hon broytt nakað og er vorðin eitt sindur søtari. Alkoholstyrkin er 5,8, og tað er mest loyvda styrkin í Føroyum.

Eisini hevur ølin fingið eina nýggja etiket í ár.